Frágreiðing frá eykaaðalfundi í HSF

Týskvøldið, tann 21. mars 2017, kl. 19:00 varð hildin eykaaðalfundur í HSF í hølum felagsins.

Møtt vóru:

H71, umboðað av Onnu Dam,

Neistin, umboðað av Súnu Mørk,

SÍF, umboðað av Einu Gudmundsen,

VÍF, umboðað av Anju Haldansen og Frígerð Egilsnes,

KÍF, umboðað av Robert Poulsen,

Kyndil, umboðað av Cristoffuri Gert Nielsen

Tjaldur við fulltrú til HSF

EB við fulltrú til HSF

Harumframt vóru møtt Gunn Ellefsen, forkvinna, Oyvindur Brimnes, starvsnevndarlimur, Gilli Wardum, starvsnevndarlimur, Hallur Danielsen frá umsitingini, Ári Rouch frá umsitingini, Jógvan Emil Nielsen, Djóni Højgaard, og Jóhan J. Lamhauge.

Forkvinnan bjóðaði vælkomin og setti fram uppskot um at velja Jóhan J. Lamhauge sum fundarstjóra.

Uppskotið varð einmælt samtykt og við øllum atkvøðum.

Fundarstjórin staðfesti, at innkallingar- og framløgufreistir felagsins sambært viðtøkunum vóru hildnar, og lýsti hereftir fundin lógligan og viðtøkuføran.

Á skránni var fylgjandi:

- Val av limi og eykalimum í starvsnevndina.

Uppskot vóru komin inn um at velja Jógvan Emil Nielsen sum lim í starvsnevndina og at velja ávikavist Birgir F. Kass og Djóna Højgaard sum varalimir í starvsnevndina.

Uppskotið varð einmælt samtykt og við øllum atkvøðum.

Onnur evni vóru ikki á skránni.

Fundurin lokin.

Fundarstjóri

___________________________

Jóhan J. Lamhauge